Helgi Abramhamsen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 40/2019 frá Johan Dahl, løgtingsmanni um matrikulering og útskifting av jørð, settur landsstýrismanninum í umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu long er veruliga málsviðgerðartíðin í sambandi við matrikulering og útskifting av jørð - býtt upp á høvuðssløg av málum?
2. Hvussu nógv mál um matrikulering og útskifting eru innkomin til málsviðgerð í 2017, 2018 og 2019 - býtt uppá høvuðssløg av málum?
3. Hvussu nógv mál um matrikulering og útskifting eru avgreidd í 2017, 2018 og 2019 - býtt uppá høvuðssløg av málum?
4. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at stytta um málsviðgerðartíðina?
5. Eru meira orka og peningur sett av til málsviðgerð av matrikulering og útskifting í 2020?

Svar:

Til spurning 1

Matrikuler málsviðgerð er sera ymisk og fjøltáttað. Ásett er í § 20, sbr. § 17, í matrikullógini, at øll matrikuler mál skulu til hoyringar hjá avvarðandi kommunu. Hartil kunnu aðrir hoyringarpartar vera inni í myndini, t.d. Búnaðarstovan, Landsverk, friðingarmyndugleikin o.s.fr. Hoyringartilgongdin tekur í minsta lagi tveir mánaðir, men kann eisini vera drúgvari. Í sambandi við útstykkingar kemur eisini ofta fyri, at grundstykkini verða seld eins skjótt, sum tey eru projekterað, men matrikulmyndugleikin kann ikki gera uppmátingar og seta stykkini av, fyrr enn útstykkingin er liðug við vegum og øllum installatiónum. Hesum veit borgarin ikki av, og tí fær matrikulmyndugleikin ofta ábyrgdina av eini seinking, har tað í veruleikanum snýr seg um, at grundstykkini eru seld ov tíðliga. Sostatt kann tað verða sera stórur munur á brutto-málsviðgerðartíðini og netto-málsviðgerðartíðini, tað vil siga tíðin, síðan søkt verður, roknað í mun til tíðina, har arbeiðast kann við málinum. Harumframt kunnu tað vera ymsar byrðar á ognunum, arbeitt verður við, sum skulu avlýsast, áðrenn málini kunnu avgreiðast. Slíkar kunnu t.d. vera ymiskir servituttar (t.d. traðarservituttar), friðingar, veðrættir o.a.

Hesi seinastu 2-3 árini hevur stórt trýst verið á matriklinum. Neyðugt hevur tí verið at raðfesta málini soleiðis, at tey sum høvdu størsta skund, hava verið avgreidd fyrst. Hetta eru útstykkingar ella gerð av grundstykkjum, mál um eigaraíbúðir, vinnustykki og mál av stórum fíggjarligum týdningi.

Møguligt er ikki at svara spurningi 1 nágreiniliga, tí journalskipanin hjá Umhvørvisstovuni skrásetur einans brutto-málsviðgerðartíðir og ikki netto-málsviðgerðartíðir. Hagtølini í skipanini gerast misvísandi orsakað av, at tíðin, har Umhvørvisstovan t.d. bíðar eftir einum øðrum myndugleika ella

supplerandi upplýsingum frá umsøkjaranum, telur sum málsviðgerðartíð, hóast matrikulera málið liggur stilt.

Verður hugt at brutto-málsviðgerðartíðunum sæst, at mál um sundurbýti taka í minsta lagi 3 mánaðir at gera. Tað kemur tó rættiliga ofta fyri, at ein byggiharri ger broytingar í projektunum, at kommunan ikki hevur góðkent útstykkingarætlanina ella krevur broytingar í henni, eins og aðrar seinkingar kunnu vera. Tí kann málsviðgerðin gerast longri, so slík mál taka millum 3 og 12 mánaðir at avgreiða. Onkur dømi eru tó um líknandi mál, sum av ítøkiligum orsøkum hava tikið longri tíð at avgreiða. Mál um eigaraíbúðir hava somuleiðis høga raðfesting og taka vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Innangarðs útskiftingar eru størri verkætlanir, sum ganga yvir fleiri ár. Hesar kunnu ikki samanberast við matrikuler mál og eru tí ikki tikin við í hagtølini. Uttangarðs útskiftingar fylla ikki eins nógv, men hesar verða ofta seinkaðar orsakað av serstøkum viðurskiftum á staðnum.

Til spurning 2
Innkomnar matrikulerar umsóknir 2017-19, bólkaðar í høvuðsmálssløg

	Sundurbýti	Sundurbýti til samanlegging	Marknaumskipan	Marknaumskipan til veg	Eigaraíbúðir
2017	89	24	76	9	4
2018	102	28	84	23	3
2019	66	20	54	10	1

Viðvíkjandi spurninginum um útskiftingar verður víst til svar 1 omanfyri.

Til spurning 3
Avgreidd matrikuler mál 2017-19, bólkað í høvuðsmálssløg

	Sundurbýti	Sundurbýti til samanlegging	Marknaumskipan	Marknaumskipan til veg	Eigaraíbúðir
2017	78	20	63	6	1
2018	76	24	78	10	4
2019	76	19	54	15	2

Viðmerkjast skal, at tølini fyri avgreidd mál í 2018 eru ávirkað av, at tvey starvsfólk í 6 mánaðir vórðu tikin úr málsviðgerðini og sett til at fyrireika talgildingina av matrikularkivinum.

Viðvíkjandi spurninginum um útskiftingar verður víst til svar 1 omanfyri.

Til spurning 4
Umhvørvisstovan hevur í longri tíð arbeitt við at endurskoða fyrisitingarligu mannagongdirnar soleiðis, at málsviðgerðartíðin kann styttast. Hetta kann gerast við eina kunngerð um matrikulert arbeiði við tilhoyrandi vegleiðingum. Eisini hevði ein sokallað planskrá, sum skal innihalda allar galdandi byggisamtyktir, lætt munandi um arbeiðið.

Til spurning 5
Ætlanin er at fáa arbeiðið við kunngerð um matrikulert arbeiði við tilhoyrandi vegleiðingum avgreitt so skjótt sum til ber.

Ein hægri játtan til Matrikulin hevði ikki sæst aftur beinanvegin í lækkandi málsviðgerðartíðum. Málsøkið er serstakt, og tað tekur eini 2-3 ár at læra fólk upp, so tey kunnu arbeiða sjálvstøðugt. Einans útbúnir landinspektørar ella landmátarar hava fakligan førleika til at taka sær av matrikulerari málsviðgerð beinanvegin, tey verða sett í starv. Seinastu 10 árini er tað einans ein føroyingur, sum hevur lokið útbúgvingina.

Umhvørvisstovan hevur seinastu tvey árini roynt at vekja áhuga fyri fakøkinum við at bjóða nýliga útbúnum miðnámsskúlanæmingum tíðaravmarkað starv sum starvslesandi. Vónin er, at hetta sum frálíður fer at geva úrslit, so fleiri føroyingar velja hesa útbúgvingarleiðina.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 21. januar 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður